## DAGSINS MEINING

### Oljuting og ráðstevna um livikor

Einki minni enn ein av okkara mentanarligu perlum og grundvøllum var karmur um eina komandi føroysku oljuvinnu, tá Oljutingið skipaði fyri orðaskifti herfyri. Hetta snúði seg um tey krøv vit seta oljufeløgunum fyri at kunna vera við í leiting á landgrunninum, krøv um føroyska luttøku í hesum virksemi. Ein áhugaverdur spurningur, ið vit eiga at taka upp til viðgerðar alla tíðina. Og tað var heldur ikki sørt av orðadrátti um spurningin, tá formaðurin í Búskaparráðnum og formaðurin í Oljuvinnufelagnum "brustu" saman. Hvør við sínum avgjørdu og greiðu sjónarmiðjum – fyri og ímóti almennari uppílegging í vinnuna so ella so. Har annar heldur, at tað almenna skal halda fingrarnar langt vekk frá vinnuni og lata marknaðarkreftirnar ráða, meðan hin heldur tað vera heilt náttúrligt og skilagott, at tað almenna setir ávís minimumskrøv til oljufeløgini fyri harvið at tryggja longu frá byrjan, at eisini føroysk vinna kann hava ein møguleika at vera við í nýggju vinnuni.

Spurningurin um føroysku luttøkuna verður serliga aktuellur, tá og um tað verða gjørd stór oljufund. Tá mugu vit til at gera støðuna upp: um vit ynskja at so nógv avleitt virksemi sum gjørligt skal vera av hesi vinnu í Føroyum, ella vit helst ikki síggja oljuna her ella nógv virksemi í sambandi við framleiðslu. Tá mugu vit til at gera okkum greitt, hvat vil vilja við eini oljuvinnu, og tí eru spurningarnir Oljutingið reisir, viðkomandi, men teir eru kanska ikki nóg motiverandi at fara í holt við av álvara, fyrr enn tað er staðfest nógv olja. Harfyri eiga vit sjálvandi at fyrireika okkum nú og hava grundarlagið fyri eini støðutakan upp á pláss.

Og tað er kanska nettupp í hesum sambandi, at ráðstevnan um Livikor Føroyinga, sum er í Havn í hesum døgum, er áhugaverd, viðkomandi og relevant. Henda ráðstevna hevur nettupp til endamál at umrøða spurningin um at hava tey neyðugu amboðini til tess at kunna velja henda ella handa útviklingin í samfelagnum. Velja vit at nógv virksemi av oljuframleiðslu skal vera her á landi, so mugu vit eisini kunna gera metingar at taka støðu út frá, hvussu vit herberga innfluttari arbeiðsmegi, geva henni tak yvir høvdið, atgongd til barnagarðar osfr. Sosialurin hevði fyri tíð síðani sera áhugaverda samrøðu við samfelagsfrøðing um nettup tørvin á hagtølum, sum kunnu lýsa føroyska samfelagið. Niðurstøðan hjá Randi Fredriksberg var, at vit mugu til at útvega okkum tey røttu amboðini, eitt nú neyv hagtøl, til tess at kunna meta um og taka avgerðir um framtíðar útviklingin, her ikki minst í sambandi við eina komandi oljumenning.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Oraklið á Glyvrum, hesin sjálvsupphevjandi tokulúður, hevur aftur talað

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



**Undirritaði, eftir Orakilsins tykki paranoidi og skizofreni politiski mótstøðumaður, saman við restini av andstøðumanningini drýpa høvur í djúpari samkenslu við hesum orakli, sum eftirhondini á føroyska og eisini á útlendska politiska pallinum hevur spælt síni kort á ein slíkan hátt, at ONGIN - hvørki hansara partamenn/samgongumenn ella aðrir politiskir mótspælarar taka hann fyri fult , ja rætt og slætt hava mist virðingina fyri hesum sjálvsupphevjandi persóni, sum er vorðin ein politiskur hofnar.**

Tokulúðurin á Glyvrum er vorðin ein politiskt vittigheit, sum slær uppá stórutrummu, rópar hart fyri líkasum á tann hátt at styrkja sítt ego -ella kanska fortreingja minnilutakensl-urnar.

Hann kallar sín løgmann og "landsfaðir" og sín fyrrverðandi fiskimálaráðharra fyri djúpt kriminellar og óbrúkiligar alla aðrastaðni enn í Føroyum,- og setur harvið samgongu og alt Føroya fólk í eitt "óheppið" ljós úteftir, fyri síðani at ETA alt í seg aftur ,- lítið manssømiligt má sigast.

Hann hongdi vinnumálaráðharran út í samband við setan av nevnd í framtaksgrunninum og nú tosar nú við stórum rópar hann upp saman við restini av samgonguni um "útreiðsluneutralar" eykajáttanir

Livst so spyrst hvussu oraklið fer at tackla hesar?

At vit eru við at enda okkum í eini truplari fíggjarligari støðu afturhevur oraklið fyrst nú fingið eyguni upp fyri,- aftaná í skjótt fimm ár at hava verið ein partur av eini "forbrúks-samgongu" jatygum lesa rætt eini forbrúks-samgongu og ikki eini FULLVELDIS-SAMGONGU, - hesir hava forkomið sínum egna politiska máli við m.a. at lata tær almennu útreiðslurnar eksplodera og eru hesar hækkaðar við yvir einari MILLIARD frá 1998 til 2002.

Hetta orakulsum mánað eftir mánað móttekur danskar skattapengar frá vaskikonnuni á Nørrebrúgv til egna politiska propaganda og tekur gleðiliga við útbreiddum ørmum móti feitari danskari fólkatingsløn, sum var proklamerað á sinni at fara í stórapott hjá tjóðveldinum – kom hon forrestin nakrantíð har?

Vágs Havn sum er orsøkin til hansara álop á meg, er sum eg havi skrivað áður blivin stemma niður við hjálp frá Hergeir og Jenis og er sambært viðmerkingar í lógini og á fíggjarlógini 2003 settar 5 mio av sum endurgjald til Vágs Býráð – tað fyriliggur ONGIN onnur játtan sum er og hvat framtíðin kemur at vísa kann eg av góðum grundum ikki siga nakað um.

Kári P. Højgaard sum er samgongulimur og limur í fíggjarnevndini har undirritaði eisini er limir, hevur frá tingsins røðarapallið sagt at 5 mio er tað endaliga gjaldið og B.Djurholm hevur uppá munnligan fyrispurning frá mær svarað at tað ikki fyriliggur onnur játtan.

Hvat viðvíkur Vágs Havn annars, so skal eg eisini rættleiða Oraklið eitt sindur, -tað var nevniliga ikki tjóðveldistingmaðurin í suðri sum byrjaði málið um Vágs Havn á sinni – tað var undirritaði saman við Vágs Býráð, - har undirritaði gjørdi vart við at umstøðurnar at lossa og lasta skip í Vági vóru vónleysar orsakað av dýpi og heitti á kommununa um at gera djúphavn , so størri skip kundu lossa og lasta.

Undirritaði var eisini saman við Vágs Býráð á fundi við landsstýrið um hetta mál sum endaði við at blíva eitt tilboð um samferðslu og djúphavn.

Verklagslógin um útbygging av Samferðsluhavnini/djúphavnini í Vági bleiv løgd fyri tingið í fjør av undirritaða fyri sambandsflokkin og Hendrik Old fyri javnaðarflokkin, hetta uppskot skuldi viðgerast við 3. viðger í nov/des 2002

Uppskotið bleiv tikið aftur , av einari orsøk,- nevniliga at Hendrik Old og undirritaði fingu Bjarna Djurholm landsstýrismann at ganga við til at fáa Øravík/Hov tunnilin við á fíggjarlógina, og at 50% svarandi til uml 8-10 mio skuldi gjaldast til djúphavn/vinnuhavn í Vági sum kompensatión fyri at siglingin á Vág bleiv niðurløgd og samferðsluhavnin harvið slept.

Aftaná at vinnumálaráðharrin hevði fingið hesi ting uppá pláss við samgongulimir sínar blivu 7 mio (sum bleiv minkað til 5 mio) í fíggjarnevndini til Vágs Havn og 7 mio settar av til Bergholsbyrjan Hov/Øravík.

So løgið tað ljóðar sást tjóveldistingmaðurin ikki í hesum leiki annað enn mær kunnugt, at hann arbeiddi ímóti hesi ætlan, tí hon ikki kom frá honum sjálvum, - ein skuldi trúð at Suðuroyggin og bestu heildarloysnirnar fyri oynna lógu honum tætt at hjartanum.

(Um oraklið vil hava hetta váttað kann hann tosa við borgarstjoran í Vági)

Hetta kann Bjarni Djurholm ivalyest eisini vátta, - um hann torur fyri sínum, - nú eina skamma stund so einigu samgongufeløgum.

At tosa um moralskar endurgjaldsskyldur frá eini samgongu har moralur er eitt banniorð- tað lati eg standa ósvarað og til Føroya fólk at døma um

Annars kann eg verða á einum máli við Oraklið á Glyvrum um, at sjálvandi er EIN samferðsluhavn tað rætta nú tunnilin kemur, - vágbingar ynsktu ongantíð annað enn eina góða vinnu og djúphavn,sum var við til at skapa aktivitet og vinnumøguleikar,- tað var landsstýrið sum kom við uppskotinum um samferðslu og djúphavn í Vági, lat okkum fáa tað uppá tað reina.

Nýggi Smyril er eisini neyðugur, og allir føringar, ikki einans suðringar eiga at gleðst um at hann kemur, - hann hevði so komið óansæð hvør sat í samgongu kann eg heilsa Oraklinum á Glyvrum, tí núverðandi Smyril siglir uppá lánta tíð og hevði ikki fingið loyvið at siglt leingi afturat, so loysnin er sjálvsøgd og mær vitandi so hava allir flokkar á tingið tikið undir við hesi ætlan.

*Framhald á síðu 11*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Leirvíksfjarðarbólkurin farin í hernað

**Eftir at hava ligið óvirkin í nøkur ár, er Leirvíksfjarðarbólkurin farin aftur til arbeiðis, tó í víðkaðum líki. Nú er bólkurin, umframt umboð fyri vinnuna og býráðið, eisini mannaður við umboðum fyri manning og einstøk ferðafólk**



*Kristian Davidsen stjóri á Strandfaraskipum Landsins verður sjálvur við í endurskipaða Leirvíksfjarðarbólkinum. Hann ynskir at koma í tættari samband við tey, ið dagliga ferðast um Leirvíksfjørð*

*Mynd Jens K. Vang*

LEIRVÍKSFJARÐARLEIÐIN
*Rúna Sivertsen*

Fyri nøkrum árum síðani, tóku klaksvíkingar stig til at stovna ein bólk, sum skuldi koma við tilmælum til Strandferðsluna um, hvussu leiðin um Leirvíksfjørð kundi fáast at virka betur. Í januar 1999 varð eitt tilmæli handað táverandi stjóranum á SSL.

Hóast bólkurin hevði fingið lyfti um at verða hoyrdur í málum, ið viðkoma skipunum, sum sigla um Leirvíksfjørð, hoyrdist einki aftur frá leiðsluni á Strandferðsluni.

Men nú er nýggjur stjóri settur á SSL, og hann vil fegin koma í samband við norðoyingar, so teirra sjónarmið eisini koma við, tá avgerðir skulu takast.

Rani Nolsøe, menningarstjóri hjá Klaksvíkar Kommunu, hevur verið formaður í bólkinum, síðani hann fyri um 6 árum síðani varð skipaður.

### Víðkaður bólkur

Rani sigur, at bólkurin, sum nú eisini umfatar umboð fyri manning og pendlarar, av álvara er farin aftur til verka.

- Vit halda, at tað er neyðugt, at tey, sum brúka hesa farleið dagliga, hava møguleika at gera sína ávirkan galdandi, sigur hann.

Bólkurin hevði sín fyrsta fund hóskvøldið. Samtykt varð at senda stjóranum á SSL, Kristiani Davidsen og landsstýrismanninum við samferðslumálum, Bjarna Djurholm, eitt skriv, har boðað verður frá, at bólkurin er farin aftur til verka. Í brævinum verður eisini stórur dentur lagdur á nakrar av teimum mest átrokandi spurningunum.

Leirvíksfjarðarbólkurin, ið skipaði seg við Rana Nolsøe sum formanni, hevur sín næsta fund komandi hósdag.

**Skriv frá Leirvíksfjarðarbólkinum, sent Kristiani Davidsen, stjóra á Strandfaraskipum landsins og Bjarna Djurholm, landsstýrismanni við samferðslumálum:**

Á fundi í Klaksvík 27. mars 2003 fór Leirvíksfjarðarbólkurin, eftir áheitan frá Norðoya Vinnulívsráði, Kristiani Davidsen, stjóra á SSL, Bjarna Djurholm, landsstýrismanni við samferðslumálum og Klaksvíkar Býráði, aftur til verka.

Í bólkinum eru umboð fyri vinnuna í Norðoyggjum, manningina umborð á strandfaraskipunum, Norðoya Vinnulívsráð, brúkarar/pendlarar og Klaksvíkar Býráð. Limirnir eru: Símun Dam, Pauli Magnusson, Elmar Zachariassen, Óluva Klettskarð, Jógvan Høj, Rúna Sivertsen og Rani Nolsøe.

Á fyrsta fundinum leggur bólkurin herðslu á, at Dúgvan undir ongum umstøðum má takast úr sigling. Verður kapasiteturin á leiðini skerdur, gerst SSL ein beinleiðis forðing fyri teirri menning, sum verið hevur í Norðoyggjum seinastu árini.

Harumframt skerjir SSL sítt egna inntøkugrundarlag og verður atvoldin til, at landskassin missir inntøkur.

Eisini metir bólkurin, at neyðugt er at biðja Strandfaraskip Landsins um alment innlit í fíggjarskapin á farleiðini um Leirvíksfjørð. Hetta, tí tað yvirhøvur ræður ein ávísur ivi um teir upplýsingar, sum hava verið almannakunngjørdir.

Harumframt samtykti Leirvíksfjarðarbólkurin at arbeiða fyri:

- At Sam verður lagdur í Klaskvík um næturnar, soleiðis at fyrsti túrur um morgnarnar verður úr Klaksvík
- At ætlaða billetteringin á skráanum ikki verður sett í gildi, tá umstøðurnar av hesum versna munandi fyri tey ferðandi
- At møguleiki verður at keypa ferðaseðil, áðrenn farið verður umborð, og at møguleiki eisini verður at gjalda aftur og fram í einum
- At Leirvíksfjarðarbólkurin fær tilmælisrætt í málum, sum beinleiðis snúgva seg um farleiðina um Leirvíksfjørð.

Bólkurin, sum nú er farin til verka, fer at hava regluligar fundir, har øll mál í sambandi við leirvíksfjarðarleiðina fara at verða viðgjørd.

# Gravgangur eftir Country Sisters

TÍÐINDASKRIV

Tað kann ikki sigast annað enn, at fólk eru áhugað at hoyra og síggja tjekkisku Country Sisters á palli í Føroyum. Hotel Føroyar, sum á hvørjum ári bjóðar einum ella tveimum bólkum hendan vegin, hevur verið fyri rættuligum ódnarveðri seinastu tíðina. Tilboðið við gisting, borðhaldi og dansi er sera væl umtókt og eru longu 200 fólk á bíðilista. Frá hotellinum siga tey seg ikki hava upplivað slíkt áður.

Tíanbetur fyri tey mongu country-áhugaðu er meira enn tann eina konsertin í Føroyum. Umframt framførsluna fríggjakvøldið 4. apríl vera tær eisini at hoyra í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið 5.apríl. Atgomgumerki fáast í forsølu í Kunningarstovunum og í Shellstøðini í Gøtudali. Í Fuglafirði verður eisini møguleiki at fáa ein góðan bita, eingin minni enn Birgir Enni fer at borðreiða við ymiskum úr sjónum. Bert 100 fólk sleppa til stóra fiskaborðið í Fuglafjarðar Mentanhúsi, so her ræður um at vera skjótur at bíleggja borð.

Live-fløgurnar við Country Sisters, sum komu í sølubúðirnar fyrr í mánaðinum, eru longu útseldar. Næsta sendingin við fløgum er á veg. Tær skulu eisini á pallin í Portalen í Danmark í næstum saman við øðrum kendum Country-bólkum. Tær hava í fleiri ár ferðast runt í Europa og framført fyri fullum húsum. Nú er túrurin komin til okkara at uppliva eina spennandi framførslu countrytónleiki.



*Framhald av síðu 10*

Undirritaðið tók stig til - saman við restini av tingmanningini í Suðri skipað fyri einum kunningartúri fyri løgtingið til Suðriar í fjør.

Eitt slíkt tiltak burdi sjálvandi verið gjørt fyri langt síðani, men betri seint enn ongantíð, og haldi eg at hesin túrur fekk lýst fyri tingmanning og embætisfólki sum vóru við, støðuna í Suðri .

Tað er nógv gott í Suðuroynni, men tað er so sannliga eisini nógv sum liggur á láni millum annað vegakervið sum heild, tunnlarnir Hvalba og Sandvík sum eru alt ov lágir til lastbilar og bussar o.m.a

Hesin túrur gjørdi eisini at m.a. Kári P. Højgaard bleiv heitur talsmaður fyri "bakkaverjuni" í Sumba í fíggjarnevndini – takk skal hann hava fyri til tað.

Tá ORAKLIÐ tosar um Almanna –og heilsuskúlan – hvussu er hann so raðfestur av hesi samgongu?? – eru t.d. hansara framtíðar fortreytir fyri at virka í Suðri høgt raðfestar?

Miðnámsdskúlin skal verða vælkomin í Vági , men eg má gera eitt hjartasuff her,- vit útbúgva okkara ungu til at flyta burtur frá heimbygdum sínum fyri ongantíð at venda aftur, og ver

Tað skal ikki eitt onkisigandi ORAKUL av Glyvrum, ein tóm buldrandi politisk tunna, sum hevur niðurgjørt bæði seg sjálvan og sín flokk, til at døma um - hvørki mín egna, ei heldur sambandsfloksins politikk, - tað er hann ikki førur fyri, - hann dugir hvørki fólkaskikk ei heldur at stýra sær sjálvum ella ørðum hann hevur við at gera, so hvussu í harrans navni skal hesin stýra Føroya landi.

ORAKLIÐ tosar eisini um ein ivaleyst (tjóðveldis)høvund sum skal hava sagt at í sambandsflokkinum var ómoralur settur í system??

Har fer Oraklið so púra skeivt, tað finnist bara eitt stað í føroyskum politikki har hetta fyribrygdi finnist, -nevniliga í sitandi samgongu.

Suðuroyggin stendur mín hjarta nær og hevur altíð gjørt tað , – óansæð um eg eri í politikki ella ei og vil eg til einhvørja tíð verja og verða við til at byggja hesa oyggj upp saman við suðringum og øðrum góðum fólki.